# *Tíðindaskriv Mars 2011*

*Hey tit øll!*

*Sum vit skrivaðu um í síðsta brævi, so høvdu vit fleiri føroyingar á vitjan í februar, og hesin mánaðurin byrjaði eisini á sama hátt. Vit høvdu vitjan av tveimum ungum føroyingum, Trúgvi Vestergaard Dam og Selma Tausen Olsen. Selma var í Kenya í samband við at hon var á Alterna og Trúgvi var við sum ferðaleiðari. Tey høvdu tó ikki tíð at verða við okkum í Piave, men vóru heima hjá okkum til eina máltíð. Hetta var leygardagin 5. mars. Dagin eftir fóru vit so til Nairobi at taka ímóti Sharon, elstu dóttur okkara, sum kom at vitja okkum í 14 dagar. Hon ynskti at hjálpa til í arbeiðinum hjá okkum og tað slapp hon eisini. Hon var við til at vælsigna fleiri familjur og einstaklingar. Tað heilt einastandandi vit upplivdu var sunnudagurin 13. mars, har vit høvdu arrangerað eina fest. Sharon hevði skipað fyri einum dramastykki, har vit sum familja spældu. Eisini dansaðu hon og Kezia ein hip hop dans. So var tíð hjá okkum at syngja ein sang fyri fólkunum og her var tað at ein mamma við 4 børnum kom fram og ynskti at blíva frelst. Tað var eitt fantastiskt upplivilsi. At enda serveraðu vit mat fyri fólkunum, sum Sharon hevði latið keypt. Her fingu tey Ugali, kjøt og grøntsakir og so saft at drekka. Ein sera góður dagur í Piave.*

*Hendan kvinnan, Esther,  sum bleiv frelst, býr saman við sínum 5 børnum í Piave. Maðurin situr í fangahúsið og hon hevur ongan, sum kann hjálpa sær við mati ella við børnunum. Hon má ganga hús í hús og bidda mat og børnini ganga ikki í skúla, tí hon ikki hevur ráð til hetta. Í skúlunum, úti á bygdunum, noyðist ein at keypa sítt egna skriviborð, og hetta hevur hendan mamman ikki ráð til. Ikki stórt av arbeiði er, so her er heldur ikki stór vón at skaffa nakrar pengar til at yvirliva. Vit gjørdu so av at tosa við hana og vilja hjálpa henni. Vit hava keypt henni hópin av matvørum og royna at skaffa stuðlar, sum kunnu hjálpa børnunum at fara í skúla. Hetta kostar uml. 500 kr. pr. barn, tí at her skulu keypast; skriviborð, skúlabúni, skógvar, bøkur og annað skúlating. Vónandi eru fleiri, sum vilja verða við at stuðla hesum. Takk fyri.*

*Sharon var eisini og vitjaði ommurnar, har hon gav teimum hópin av grøntsakjum og eina góða máltíð. Hendan dagin fingu tær eisini eina sodavatn, sum tær ikki høvdu smakkað í fleiri ár. Rama, fitness lærarin, var eisini við hendan dagin og ommurnar vóru so glaðar at Sharon kundi gera fimleik saman við teimum.*

*Við á ferðini til Kenya, hevði Sharon eina gávu við frá einum føroyingi til sítt sponsorbarn her í Piave og vit høvdu tað gleði at vitja hesa familjuna har Sharon kundi geva hesari gentuni gávuna frá sponsorunum úr Føroyum. Tað var so stuttligt at síggja hvussu glað hon og familjan blivu tá hon lat gávuna upp. Eisini fekk hon ein pakka av "Crack it" keks, sum tey ongantíð høvdu sæð áður. Vit tóku video upp, har hon deilir við familjuna. Tey vóru ovurfegin. Tað var eisini tíð hjá teimum at sáa, og av tí at ráðini ikki vóru til tað, so var Sharon við til at vælsigna tey við at geva teimum fíggjarligan stuðul til at keypa mais fræ og gjødning, so tey kundu fara at sáa. Sharon segði at hetta var besti dagurin hjá henni í Kenya. Ein gleði at kunna vælsigna familjurnar soleiðis. Hon fór aftur til Føroya 20. mars.*

*Á møtinum 20. mars bóðu vit fyri einari kvinnu, sum hevði trupulleikar við hondini. Hon var hovin og hon hevði pínu í hondini. Sunnudagin 27. mars vitnaði hon at hondin var fullkomiliga grødd. Vit síggja nú eisini at fólk byrja at góðtaka at Harrin ikki bara frelsir, men eisini grøðir. Tað hevur verðið sera trupult at fáa fólk fram til forbøn fyri sjúku, men nú byrjar at broytast.*

*Nú er regntíðin endiliga komin aftaná 4 mánar við turki og tí er so hjá fólkunum at sáa. Her í Kenya er tað serliga mais, sum verður sáa tí her fáa familjurnar meginpartin av sínum mati burturúr. Vit høvdu so gjørt av at royna at hjálpa til við at keypa fræ og gjødning, og vit fingu nakað av pengum inn til hetta. Vit keyptu so mais fræ og gjødning, sum vit um-pakkaðu í smærri nøgdir. Síðani fóru vit til Piave og góvu teimum ymisku familjunum hetta. Gleðin var sera stór tá vit*

*komu á vitjan í ymisku húsunum. Til ta einu familjuna góvu vit eisini eina bíbil, sum vit høvdu lova einu kvinnuni, og gleðin var sera stór. Hon græt og prísaði Harranum fyri bíbliuna. Fólk fóru so beinanvegin út á markirnar at sáa og vit hoyrdu tey syngja av gleði meðan tey arbeiddu. Eisini góvu vit fræ og gjødning út sunnudagin 27. mars á møtinum, av tí at vit ikki vita hvar allar familjurnar búgva.*

*Vit hava eisini verið og vitja eitt eldri par, sum hevur ymiskar trupulleikar. Vit høvdu nógvar matvørur við og eisini hava vit goldið fyri heilivág tí tey hava verið sjúk. Vit høvdu eisini møguleikan at biðja saman við teimum.*

*Vit eru nú eisini byrjaði at samla menninar saman einaferð um vikuna. Hetta er hvønn mikudag seinnapart og hetta er til stóra gleði fyri teir. Vit eru byrjaði at undirvísa frá byrjanini av bíbliuni, tí nógvir av teimum ikki kenna til bíbliusøgurnar. Eitt, sum teimum dámar sera væl, er tá Rama ger fimleik saman við teimum. Fleiri og fleiri menn samlast og her ynskja vit at tit serliga biðja fyri hesum tiltakið.*

*Hesa seinastu tíðina hava vit havt ein ungan mann afturat okkum í Piave. Hetta er Rama, sum er fitness lærari. Hann hevur muslimska bakgrund og er til sera stóra hjálp hjá okkum. Hann hevur verðið til stóra hjálp nú vit hava keypt fræ og umpakkað og givið út. Hann er við hvønn sunnudag á møtinum, har hann hevur einar 5-10 min. at gera fimleik við øllum fólkunum. Hetta dámar teimum sera væl. Eisini er hann við tá vit samla menninar. Her er hann tulkur. Eisini er hann við okkum tá vit vitja ymisku familjurnar í Piave. Vit takka Harranum fyri at hann hevur leitt Rama inn á okkara veg.*

*Esther, sum hevur verið í læru sum hárfríðkan, er nú liðug vit tað er nú byrjað á vakurleika skúla (Beauty therapy). Hetta er møguligt hjá henni, tí hon hevur ein stuðul úr Føroyum, sum hevur goldið fyri hetta.*

*Dagliga ringja serliga nógv ung og biðja um hjálp. Tað eru so ymiskir tørvir og vit royna tað vit kunna at hjálpa, men av tí at fíggjarliga ikki røkkur til altíð, so er tað oftani at vit noyðast at siga nei. Tað, sum vit kunnu hjálpa teimum við í flestu førum, er at keypa teimum matvørur.*

*Gott er við nógvum regni so at tað, sum var av sviðið nú kann grønkast aftur og bøndurnir kunnu sáa. Støvið hevur lagt seg her í Nakuru og luftin er heilt annarleiðis. Vit herja á at hjálpa til her, men hava brúk fyri nógv fleiri stuðlum til at halda fram her. Vit vóna og biðja um at Harrin skal minna enn fleiri á at stuðla okkum fíggjarliga. Bilurin hjá okkum er vorðin alt ov lítil til tað virksemi vit hava nú, tí vit eru fleiri og fleiri, sum eru í bilinum og til at taka vatn og nógvu matvørurnar, fræ, gjødning og nógv annað við, noyðast vit at skifta til ein størri bil. Vit takka tó fyri tann stuðul vit hava nú og vita at Harrin signar tey, sum stuðla. Tað arbeiði vit hava gjørt hevur Harrin signa. Umhvørvið í Piave er heilt annarleiðis nú. Fleiri og fleiri fólk góðkenna tað arbeiði vit gera har og fleiri og fleiri eru við á møtunum.*

*Um tú ynskir at stuðla okkum fíggjarliga, so er konto nummarið hjá okkum:*
*6460-426.093.9 í BankNordic*

*Takk fyri forbøn og fíggjarligan stuðul.*

*God bless.*

*Stella, Petur og Kezia Zachariassen*
*Nakuru, Kenya*
*Tel. +254 713832983 ella +254 713832987*